# inum



beiði sínum, tí onkur vil frætta, hvussu nógv teir fingu henda seinasta túrin



- At fiskaprísurin er høgur ger arbeiðið hugaligt, sigur Hans Pauli Purkhús



Tummas Andreasen kann fegnast um ta stóru veiðuna henda seinasta túrin



Dýrdarveður var í Klaksvík á middegi í gjár, tá Brattaskor legði veiðuna upp. Seinni varð kortini boðað frá verri veðri

*Tað er altíð gott, tá fiskaprísurin er góður. Tað hjálpir sjálvandi væl til*

forsmáa, sigur Hans Pauli Purkhús.

**Prísurin í lagi**

Eins og vanlig hevur verið, vóru teir eisini tveir mans við Brattaskor, tá teir løgdu veiðuna upp á Kósini á middegi í gjár.

Skipanin er kortini soleiðis, at teir altíð hava ein mann í landi, sum stendur fyri egningini.

Hesir tríggir kunnu bara fegnast um, at tað hevur gingist rættiliga væl við fiskiskapinum í vetur – og prísinum!

- Tað er altíð gott, tá fiskaprísurin er góður. Tað hjálpir sjálvandi væl til, sigur Hans Pauli.

**Altíð leypa avstað**

Tá teir løgdu veiðuna upp á Kósini á middegi í gjár var dýrdarveður. Men tað fór tað neyvan at verða allan dagin.

Veðurforsøgnin boðaði frá nógvum vindi um kvøldið – ikki bara nógvum vindi, men hvirlum heilt upp í ódnarstyrki.

- Nei, vit fara so ongan veg í kvøld undir slíkum viðurskiftum.

- Men kanska onkur av teim størru bátunum fara. Nei, eg veit ikki rættiliga um nakar fer avstað, sigur Hans Pauli.

Ætlanin er tó at leggja frá landi onkran túr aftrat fyri jólahøgtíðina.

Streymurin er framvegis við útróðrarmonnunum, og kemur í roynd og veru ikki í hæddina aftur fyrrenn tollaksmessudag

Teir ætla sær avstað so skjótt sum líkindi verða aftur.

Tað er helst so sum Hans Pauli tekur til:

- Vit eru bara tveir mans við. So ein kann bera skjótt at, um vit ætla okkum til útróðrar.

- Tað er ikki tað sama aftur um talan var um ein størri bát við seks monnum. Vit kunnu altíð leypa avstað!